LM-136/2020

Tórshavn 29. Mars 2021

Hoyringskriv

Fylgiskjal 4.

Viðmerkingar til lógaruppskotið til Løgtingslóg um Veiðugjøld fyri fiskiskip (veiðugjaldslógin).

Fyrst av øllum vil eg sláa fast at eg slett ikki haldi at manningin á nakran hátt eigur at taka lut í hesum gjøldum. Sjálvandi eru tað tey sum fáa hettar tilfeingi latið uppí hendrunar, sum einsamøll eiga at gjalda tað sum landi forlangar afturfyri.

Soleiðis frøddi tað meg á ein ella anna hátt at manningarfeløgini fullkomiliga vóru forbíðgingin, tá ið ein arbeiðsbólkur bleiv settur at arbeiða við hesari lógini. Serliga tá man sá at hin sáttmálaparturin, reiðaranir vóru umboðaðir við ikki minni enn 4 umboðum.

Men nú uppskotið fyriliggur, so er tað einki í tí ið sanførur meg um, at manningarnar eru frítiknar fyri luttøku í hesum gjøldunum.

Vónandi fari eg skeivur, og fer viðgerðin í Vinnunevndini at føra við sær, at uppskotið er soleiðis snikka til at tað vendur beint, tá tað kemur út aftur higani.

Um eg skal gerða viðmerkingar til veiðugjøldini, so havi eg viðheft eitt rokniark sum sínur hvussu gjaldið fer at fella út, vísandi til ymiskar avreiðingarprísir, og fyri botnfiskin, eisini fyri tey ymisku produktini.

Talið við "feitari" skrift við reyðum, vísur hvat avreiðingar prísurin skal verða fyri at raka somu upphæddir pr. kilo sum "gamla" veiðugjaldið.

Um vit siggja burt frá prísinum seinasta ár, sum á mangan hátt var ávirkaður av korona, so tykist lógarbroytingin at føra við sær at gjaldið fer upp um prísurin kemur upp á sama "normala" støði aftur.

Vit sóu tá at prísurin, eitt nú fyri svartkjaft, javnan lá væl yvir 2 og onkuntíð enntá yvir 3 kr/kg. Um vit koma í hesa støðu aftur, so vil lógarbroytingin viðføra at gjaldið økist munandi.

Tað sama er galdandi fyri hini fiskasløgini.

Eitt sum ein kann býta merki í er at tað er komin fylgjandi orðing inn.

§ 2. Veiðigjald skal ikki rindast av:

1. veiði, tá rættindini at veiða eru keypt á uppboðssølu og uppboðssølugjald skal rindast fyri kvotuna, ella

2. kvotum latnar fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi ella fiskiførum við fiskiloyvi til fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum.

Hettar vil alt annað líka smalka um skaran sum skal luttaka í veiðugjøldunum. Sjálvandi er hettar væl unt teimum sum hava fingið í hesar kvoturnar, og sum eisini treingja til hvørt oyra sum fáast kann til vega. Vandin við at frítaka ávísar aktørar fyri gjaldinum, er at tað verður trupult at fáa teir innaftur um "roknistykkinum" vantar pengar, og so kann endin blíva at hægri gjald verður lagt á teir aktørar sum longu eru "innanfyri".

Vísandi til fylgjandi áseting:

§ 7. Fer tøka kvotan, sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska undir 50% av miðal tøku kvotuni sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska seinastu 5 árini, lækkar veiðigjaldið tað árið kvotan er galdandi niður í 50 % av veiðigjaldinum, útroknað eftir § 9. Stk. 2. Tá staðfestast kann, at tøka kvotan sett av til

Tórshavn 29. Mars 2021

fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska eitt ár er lægri enn mørkini ásett í stk. 1, skal landsstýrismaðurin við kunngerð lýsa lækkaða veiðigjaldið sbrt. stk. 1. Er talan um kvotu av makreli, norðhavssild ella svartkjafti, lýsir landsstýrismaðurin seinast 15. juli veiðigjaldið sambært stk. 1, sum skal vera galdandi frá 1. august til og við 31. desember.

Mín spurningur er so hvussu hettar skal skiljast. Er 50% tað absolutta markið, ella er talan um eina glíðandi yvirgongd hvat % satsum viðvíkur?

Eisini haldi eg at ásetingar eru ógreiðar:

Útrokning av veiðigjaldi

§ 9. Veiðigjaldið er tað í skjali 2 ásetta prosenti av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.

***Stk. 2.** Miðal avreiðingarvirðið fyri makrel, norðhavssild og svartkjaft verður gjørt upp fyri hvørt fiskaslag sær við støði í avreiðingarprísum og nøgdum í rundari vekt fyri nevndu fiskasløg, sum fiskifør undir føroyskum flaggi landa feskt óvirkað og sum eru avreidd og fráboðað Vørn 1. juli árið frammanundan at veiðigjaldið skal áleggjast til og við 30. juni sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast.*

***Stk. 3.** Fyri botnfisk í Barentshavinum verður miðal avreiðingarvirðið gjørt upp við støðið í prísum og nøgdum av toski í rundari vekt, seldur á almennari uppboðssølu í Føroyum 1. desember annað árið frammanundan at veiðigjaldið skal áleggjast til og við 30. november árið frammanundan at veiðigjaldið skal áleggjast. Selda nøgdin av fiski og fiskavøru skal umroknast til runda vekt eftir ásetingunum um umrokningarfaktorar ásettir við heimild í løgtingslóg um sjófeingi.*

Er meiningin at gjøldini skulu korrigerast árliga, og um so er, hvussu skal hettar gerast?

Samanumtikið er talan um eitt uppskot, har man á einfaldan hátt ásetur veiðugjøldini. Tað at tað er einfalt er á mangan hátt gott, og

Ásannandi at eg sum meginregla, eri sannførdur um at manningarnar á ongan hátt eiga at luttaka í veiðugjøldunum, og at vit allarhelst grunda á hettar, slett ikki eru bodnir við í arbeiðsbólkin, sum hevur staði fyri arbeiðinum, koma manningarnar vónandi bara at uppliva batar.

Um ikki so var, so kundi stóri vandin blivið at tætti eigaraskapurin millum skip og virkir, fór at føra við sær at avreitt verður fyri "undirpris", fyri soleiðis at sleppa undan hægri veiðugjaldi. Við hesum hevði reiðarin/eigarin flutt vinningin inn á virkið, ímeðan manningarnar komu at standa sum stóri taparin.

Sjálvur eri eg avgjørt ikki sannførdur um at hettar uppskot fer at hava við sær tann stabilitet, sum er sera tíðningarmikið, grunda á at tað ikki sýnist at verða breiðari politisk semja um tað. Hinvegin er mest sannlíkt at veiðugjøldini eisini framyvir kemur at vera politisk kastibløka, við sveiggjandi gjøldum, í komandi tíðum.

Vh. Ólavur Gunnarsson formaður í Maskinmeistarafelagnum

Svatkjaftur			Norðhavssíld			Makrelur			Botnfiskur úr Barentshavinum									
Sølupr.	til. %	til. Kr	Sølupr.	til. %	til. Kr	Sølupr.	til. %	til. Kr	Sølupr.	til. %	til. Kr	Kruvdur v.h	Kruvdur u.h	Kruvdur ss	Flak+s+b	Flak-s+b	Flak+s-b	Flak-s-b
												1,18	1,50	1,80	2,60	2,90	2,95	3,25
1,00 kr	11,0%	0,11 kr	1,00 kr	15,5%	0,16 kr	5,00 kr	17,5%	0,88 kr	11,00 kr	2,50%	0,28 kr	12,98 kr	16,50 kr	19,80 kr	28,60 kr	31,90 kr	32,45 kr	35,75 kr
1,10 kr	11,0%	0,12 kr	1,25 kr	15,5%	0,19 kr	5,25 kr	17,5%	0,92 kr	11,25 kr	2,50%	0,28 kr	13,28 kr	16,88 kr	20,25 kr	29,25 kr	32,63 kr	33,19 kr	36,56 kr
1,20 kr	11,0%	0,13 kr	1,50 kr	15,5%	0,23 kr	5,50 kr	17,5%	0,96 kr	11,50 kr	2,50%	0,29 kr	13,57 kr	17,25 kr	20,70 kr	29,90 kr	33,35 kr	33,93 kr	37,38 kr
1,30 kr	11,0%	0,14 kr	1,75 kr	15,5%	0,27 kr	5,75 kr	17,5%	1,01 kr	11,75 kr	2,50%	0,29 kr	13,87 kr	17,63 kr	21,15 kr	30,55 kr	34,08 kr	34,66 kr	38,19 kr
1,40 kr	12,0%	0,17 kr	2,00 kr	15,5%	0,31 kr	6,00 kr	17,5%	1,05 kr	12,00 kr	2,50%	0,30 kr	14,16 kr	18,00 kr	21,60 kr	31,20 kr	34,80 kr	35,40 kr	39,00 kr
1,50 kr	12,0%	0,18 kr	2,25 kr	15,5%	0,35 kr	6,25 kr	18,0%	1,13 kr	12,25 kr	2,50%	0,31 kr	14,46 kr	18,38 kr	22,05 kr	31,85 kr	35,53 kr	36,14 kr	39,81 kr
1,60 kr	13,0%	0,21 kr	2,50 kr	15,5%	0,39 kr	6,50 kr	18,0%	1,17 kr	12,50 kr	2,50%	0,31 kr	14,75 kr	18,75 kr	22,50 kr	32,50 kr	36,25 kr	36,88 kr	40,63 kr
1,70 kr	13,0%	0,22 kr	2,75 kr	16,0%	0,44 kr	6,75 kr	18,5%	1,25 kr	12,75 kr	2,50%	0,32 kr	15,05 kr	19,13 kr	22,95 kr	33,15 kr	36,98 kr	37,61 kr	41,44 kr
1,80 kr	14,0%	0,25 kr	3,00 kr	16,0%	0,48 kr	7,00 kr	18,5%	1,30 kr	13,00 kr	2,50%	0,33 kr	15,34 kr	19,50 kr	23,40 kr	33,80 kr	37,70 kr	38,35 kr	42,25 kr
1,90 kr	14,0%	0,27 kr	3,25 kr	16,5%	0,54 kr	7,25 kr	19,0%	1,38 kr	13,25 kr	2,50%	0,33 kr	15,64 kr	19,88 kr	23,85 kr	34,45 kr	38,43 kr	39,09 kr	43,06 kr
2,00 kr	15,0%	0,30 kr	3,50 kr	16,5%	0,58 kr	7,50 kr	19,0%	1,43 kr	13,50 kr	2,50%	0,34 kr	15,93 kr	20,25 kr	24,30 kr	35,10 kr	39,15 kr	39,83 kr	43,88 kr
2,10 kr	15,0%	0,32 kr	3,55 kr	17,0%	0,60 kr	7,70 kr	19,5%	1,50 kr	13,75 kr	2,75%	0,38 kr	16,23 kr	20,63 kr	24,75 kr	35,75 kr	39,88 kr	40,56 kr	44,69 kr
2,20 kr	16,0%	0,35 kr	3,75 kr	17,0%	0,64 kr	7,75 kr	19,5%	1,51 kr	14,00 kr	2,75%	0,39 kr	16,52 kr	21,00 kr	25,20 kr	36,40 kr	40,60 kr	41,30 kr	45,50 kr
2,30 kr	16,0%	0,37 kr	4,00 kr	17,0%	0,68 kr	8,00 kr	19,5%	1,56 kr	14,25 kr	3,00%	0,43 kr	16,82 kr	21,38 kr	25,65 kr	37,05 kr	41,33 kr	42,04 kr	46,31 kr
2,40 kr	17,0%	0,41 kr	4,25 kr	17,5%	0,74 kr	8,25 kr	20,0%	1,65 kr	14,50 kr	3,00%	0,44 kr	17,11 kr	21,75 kr	26,10 kr	37,70 kr	42,05 kr	42,78 kr	47,13 kr
2,50 kr	17,0%	0,43 kr	4,50 kr	17,5%	0,79 kr	8,50 kr	20,0%	1,70 kr	14,75 kr	3,25%	0,48 kr	17,41 kr	22,13 kr	26,55 kr	38,35 kr	42,78 kr	43,51 kr	47,94 kr
2,60 kr	17,0%	0,44 kr	4,75 kr	18,0%	0,86 kr	8,75 kr	20,5%	1,79 kr	15,00 kr	3,25%	0,49 kr	17,70 kr	22,50 kr	27,00 kr	39,00 kr	43,50 kr	44,25 kr	48,75 kr
2,70 kr	17,0%	0,46 kr	5,00 kr	18,0%	0,90 kr	9,00 kr	20,5%	1,85 kr	15,25 kr	3,25%	0,50 kr	18,00 kr	22,88 kr	27,45 kr	39,65 kr	44,23 kr	44,99 kr	49,56 kr
2,80 kr	17,0%	0,48 kr	5,25 kr	18,5%	0,97 kr	9,25 kr	21,0%	1,94 kr	15,25 kr	3,50%	0,53 kr	18,00 kr	22,88 kr	27,45 kr	39,65 kr	44,23 kr	44,99 kr	49,56 kr
2,90 kr	17,0%	0,49 kr	5,50 kr	18,5%	1,02 kr	9,50 kr	21,0%	2,00 kr	15,50 kr	3,50%	0,54 kr	18,29 kr	23,25 kr	27,90 kr	40,30 kr	44,95 kr	45,73 kr	50,38 kr
3,00 kr	17,0%	0,51 kr	5,75 kr	19,0%	1,09 kr	9,75 kr	21,5%	2,10 kr	15,75 kr	3,75%	0,59 kr	18,59 kr	23,63 kr	28,35 kr	40,95 kr	45,68 kr	46,46 kr	51,19 kr
3,10 kr	17,0%	0,53 kr	6,00 kr	19,0%	1,14 kr	10,00 kr	21,5%	2,15 kr	16,00 kr	3,75%	0,60 kr	18,88 kr	24,00 kr	28,80 kr	41,60 kr	46,40 kr	47,20 kr	52,00 kr
3,20 kr	17,0%	0,54 kr	6,25 kr	19,5%	1,22 kr	10,25 kr	21,5%	2,20 kr	16,25 kr	4,00%	0,65 kr	19,18 kr	24,38 kr	29,25 kr	42,25 kr	47,13 kr	47,94 kr	52,81 kr
3,30 kr	17,0%	0,56 kr	6,50 kr	19,5%	1,27 kr	10,50 kr	21,5%	2,26 kr	16,50 kr	4,00%	0,66 kr	19,47 kr	24,75 kr	29,70 kr	42,90 kr	47,85 kr	48,68 kr	53,63 kr
3,40 kr	17,0%	0,58 kr	6,75 kr	19,5%	1,32 kr	10,75 kr	21,5%	2,31 kr	16,75 kr	4,25%	0,71 kr	19,77 kr	25,13 kr	30,15 kr	43,55 kr	48,58 kr	49,41 kr	54,44 kr
3,50 kr	17,0%	0,60 kr	7,00 kr	19,5%	1,37 kr	11,00 kr	21,5%	2,37 kr	17,00 kr	4,25%	0,72 kr	20,06 kr	25,50 kr	30,60 kr	44,20 kr	49,30 kr	50,15 kr	55,25 kr
3,60 kr	17,0%	0,61 kr	7,25 kr	19,5%	1,41 kr	11,25 kr	21,5%	2,42 kr	17,25 kr	4,50%	0,78 kr	20,36 kr	25,88 kr	31,05 kr	44,85 kr	50,03 kr	50,89 kr	56,06 kr
3,70 kr	17,0%	0,63 kr	7,50 kr	19,5%	1,46 kr	11,50 kr	21,5%	2,47 kr	17,50 kr	4,50%	0,79 kr	20,65 kr	26,25 kr	31,50 kr	45,50 kr	50,75 kr	51,63 kr	56,88 kr
3,80 kr	17,0%	0,65 kr	7,75 kr	19,5%	1,51 kr	11,75 kr	21,5%	2,53 kr	17,75 kr	4,75%	0,84 kr	20,95 kr	26,63 kr	31,95 kr	46,15 kr	51,48 kr	52,36 kr	57,69 kr
3,90 kr	17,0%	0,66 kr	8,00 kr	19,5%	1,56 kr	12,00 kr	21,5%	2,58 kr	18,00 kr	4,75%	0,86 kr	21,24 kr	27,00 kr	32,40 kr	46,80 kr	52,20 kr	53,10 kr	58,50 kr
4,00 kr	17,0%	0,68 kr	8,25 kr	19,5%	1,61 kr	12,25 kr	21,5%	2,63 kr	18,25 kr	5,00%	0,91 kr	21,54 kr	27,38 kr	32,85 kr	47,45 kr	52,93 kr	53,84 kr	59,31 kr
									18,50 kr	5,00%	0,93 kr	21,83 kr	27,75 kr	33,30 kr	48,10 kr	53,65 kr	54,58 kr	60,13 kr
									18,75 kr	5,00%	0,94 kr	22,13 kr	28,13 kr	33,75 kr	48,75 kr	54,38 kr	55,31 kr	60,94 kr
									19,00 kr	5,00%	0,95 kr	22,42 kr	28,50 kr	34,20 kr	49,40 kr	55,10 kr	56,05 kr	61,75 kr
									19,25 kr	5,00%	0,96 kr	22,72 kr	28,88 kr	34,65 kr	50,05 kr	55,83 kr	56,79 kr	62,56 kr
									19,50 kr	5,00%	0,98 kr	23,01 kr	29,25 kr	35,10 kr	50,70 kr	56,55 kr	57,53 kr	63,38 kr
									19,75 kr	5,00%	0,99 kr	23,31 kr	29,63 kr	35,55 kr	51,35 kr	57,28 kr	58,26 kr	64,19 kr
									20,00 kr	5,00%	1,00 kr	23,60 kr	30,00 kr	36,00 kr	52,00 kr	58,00 kr	59,00 kr	65,00 kr